betri

# Bygningstrygging

**Við okkara Bygningstrygging fært tú eina trygging, ið hóskar til tín bygning.**

**Hvat fevnir tryggingin um**
Bygningstryggingin tryggjar tín bygning móti skaða av eldi, vatni, stormi, glopraregni, omanlopi, frostspreinging, innbrotsstuldri og av fleiri øðrum orsøkum.

Tryggingin er ein nývirðistrygging. Hetta merkir, at um tað skadda ikki er virðisminkað við meir enn 30%, tá skaði hendir, so fært tú nýggjar bygningslutir fyri teir gomlu.

Um tú ikki kanst nýta bygningin eftir ein skaða, sum tryggingin dekkar, so kanst tú fáa endurgjald til at leiga onnur høli til tína fyrisiting.

Bygningstryggingin tryggjar teg, um so er, at tín bygningur er atvoldin til, at onnur fólk ella lutir hjá øðrum fáa skaða.

**Tryggingin kann víðkast til tín tørv**
Tørvurin á trygging er ymiskur. Tú kanst t.d. velja hesi ískoyti til tína Bygningstrygging:

**EL-skaðatrygging (ískoyti)**
El-skaðatryggingin dekkar føstu el-lutirnar í tínum bygningi, um ein el-skaði hendir.

Ein el-skaði er ein skaði, sum er hendur av skammlopi (kortslutningi), yvirspenningi ella induktión.

Henda trygging er tí eitt gott ískoyti til tína Bygnings-trygging.

**All riskstrygging (ískoyti)**
All riskstrygging er - sum heitið sigur - ein trygging, sum dekkar allar skaðar á bygningin, sum ikki eru undantiknir.
Talan er um ein og hvønn beinleiðis fysiskan skaða á bygningin, sum hendir brádliga og óvæntað.

Henda trygging er tí eitt gott ískoyti til tína Bygnings-trygging.

**Víðkað rørskaðatrygging (ískoyti)**
Víðkað rørskaðatrygging dekkar skaða á tað tryggjaða, orsakað av lekum frá fjaldum rørum.

Bygningstryggingin dekkar skaðar av útstreyming av vatni, men um tú ynskir dekning fyri lekar frá fjaldum rørum, eigur tú at tekna hetta ískoyti.

Fjald rør, eru rør og el-hitakaðalar, sum eru stoypt í ella fjald í gólvi, rásum, krúpikjallarum, veggjum, undir væðingum ella líknandi.

Vit dekka eisini neyðugar útreiðslur av at leita eftir lekanum og at umvæla hann, um vit dekka sjálvan skaðan.

Henda trygging er tí eitt gott ískoyti til tína Bygnings-trygging.

**Stikkleiðingartrygging (ískoyti)**
Stikkleiðingartryggingin dekkar skaða á tað tryggjaða, orsakað av lekum í stikkleiðingum í jørðini uttan fyri bygningin, og skaða á el- og sjónvarpskaðalar í jørðini uttan fyri bygningin.

Ein stikkleiðing er eitt rør til vatn, hita, gass, olju og frárenn-ingarvatn, umframt el- og sjónvarpskaðalar.

Vit dekka eisini neyðugar útreiðslur av at leita eftir lekanum og at umvæla hann, um vit dekka sjálvan skaðan.

Henda trygging er tí eitt gott ískoyti til tína Bygnings-trygging.

**Restvirðistrygging (ískoyti)**
Við eini Restvirðistrygging kanst tú eftir ein skaða velja at fáa rivið tann óskadda partin av tínum bygningi niður og byggja allan bygningin av nýggjum.

Tað er tó ein treyt, at endurgjaldið frá tryggingini fyri skaðan er meir enn 50% av nývirðinum av bygninginum.

Henda trygging er tí eitt gott ískoyti til tína Bygnings-trygging.

**Glastrygging (ískoyti)**
Glastryggingin dekkar brot á rútar og annað glas, sum er partur av tínum bygningi.

Rútar kunnu vera sera kostnaðarmiklir, og tí er henda trygging eitt gott ískoyti til tína Bygningstrygging.

**Kummutrygging (ískoyti)**
Kummutryggingin dekkar wc-kummur, sisternur, bidet, vøsk og baðikør, um so er, at tey brotna.

Hesi lutir kunnu vera kostnaðarmiklir, og tí er henda trygging eitt gott ískoyti til tína Bygningstrygging.

betri

# Bygningstrygging

**Áðrenn bygt verður**
Tá ið farið verður undir at byggja, er neyðugt at hava tryggingarviðurskiftini í lagi.

**Arbeiðstøkutrygging**
Fert tú undir at byggja, at umbyggja ella byggja afturat, eigur tú at tryggja teg væl. Vit hava røttu Arbeiðstøkutryggingina til tín bygning. Set teg í samband við okkum í góðari tíð, áðrenn arbeiðið byrjar, so vegleiða vit teg um, hvussu tú tryggjar teg á bestan hátt.

Okkara Arbeiðstøkutrygging er í trimum pørtum.
Hon dekkar:

- Sjálva arbeiðstøkuna: Tað, sum gjørt ella bygt verður
- Verandi bygning: Tá bygt verður um ella uppí, kann verandi bygningur tryggjast
- Ábyrgd: Dekkar tína ábyrgd í sambandi við arbeiðstøkuna.

**Spreingitrygging**
Skalt tú spreingja í sambandi við arbeiðið, skal serstøk Spreingitrygging teknast saman við tíni Arbeiðstøkutrygging.

Skulu størri monteringsarbeiði gerast, er skilagott at tekna eina Montagutrygging.

**Fá meira at vita**
Hendan kunningin veitir ikki allar upplýsingar um tryggingina. Vitja okkara heimasíðu betritrygging.fo.

Tú ert eisini vælkomin at seta teg í samband við okkum á tel 348 600, og fáa nærri vegleiðing frá einum av okkara ráðgevum.